# Ikki politiskur meiriluti at broyta bummgjaldið

**Hóast politikarar eru samdir um, at prísurin fyri at nýta Vágatunnilin er høgur, so eru serliga samgongupolitikarar bangnir fyri at brenna fingrarnar, verður nortið við fíggjarligu fortreytirnar hjá nevndini í P/F Vágatunnilin. Politisk uppíblandan fer at ávirka verkætlanina við Norðoyatunnlinum**



*Hóast nógv mótmæli móti høga bummgjaldinum fyri at nýta Vágatunnilin, so er ikki politiskur meiriluti fyri at broyta fíggjaligu fortreytirnar hjá P/F Vágatunnilin við at flyta part av útreiðslunum yvir í landskassan.*

BUMMGJALDIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Skulu politikarar áleggja nevndini í P/F Vágatunnilin at lækka gjaldið fyri at nýta Vágatunnilin? Spurningurin gjørdist aktuellur, eftir at nevndin í partafelagnum nú loksins hevur kunngjørt, hvat tað fer at kosta at nýta fasta sambandið millum Vágar og Streymoy.

Vágatingmenninir Marjus Dam úr Sambandsflokkinum og Jóanis Nielsen úr Fólkaflokkinum hava longu boðað frá, at eitt uppskot frá teimum liggur klárt at leggja fyri løgtingið. Uppskotið snýr seg í stuttum um at flyta raksturin av Vágatunnlinum frá partafelagnum og í staðin senda rokningina í landskassan. Bummgjaldið skal síðan bara fíggja rentur og avdráttir hjá P/F Vágatunnlinum.

Men politisku flokkarnir eru sum heild ivasamir, hvørt tað er rætt, nú tunnilin at kalla er liðugur, at fara inn politiskt og broyta fortreytirnar fyri verkætlanini. Tí við at broyta fortreytirnar fyri, hvussu stóran part av tunnlinum skal fíggjast við eginfígging, tvs. brúkaragjaldi, verður samtíðis brotið við upprunaætlanina við Vágatunnlinum.

Teir fýra samgonguflokkarnir eru samdir um, at tað er rættast at halda fast við verandi loysn, meðan andstøðuflokkarnir seta spurnartekin við, hvørt tað ikki er neyðugt at endurskoða upprunaligu ætlanina og ásanna, at landskassin má átaka sær størri part av ætlanini.

## Halda fast við verandi loysn

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, er hart ímóti at politikararnir nú leggja seg út í arbeiðið hjá P/F Vágatunnlinum. Hann vísir á, at hóaat Tjóðveldisflokkurin upprunaliga var sera ivasamur um loysnina við at lata eitt partafelag útbyggja og lutvíst fíggja undirsjóvartunnilin, so tók flokkurin undir við hesi loysn kortini tí annars hevði neyvan verið gjørligt at gjøgnumføra verkætlanina.

– Tá løgtingið samtykti at lata arbeiðið upp í hendurnar á einum partafelag, so góðtók tingið samtíðis, at partafelagið eisini ásetur kostnaðin fyri at nýta tunnilin. Eg skilji væl støðuna hjá vágafólki, men nú mugu vit halda fast við hesa loysnina, sigur Høgni Hoydal. Eftir hansara tykki er tað skeivt, at politikararnir nú fara at blanda seg uppí arbeiðið hjá nevndini.

– Hetta er eisini ein samfelagsbúskaparligur spurningur. Skal landskassin nú átaka sær størri part av útreiðslunum hjá Vágatunnlinum, so fer tað at ávirka aðrar ætlanir. Velir man t.d. at rinda raksturin av tunnlinum úr landskassanum, so broytir tað samtíðis fortreytirnar fyri verkætlanini við Norðoyatunnlinum. Tí so mugu vit ásanna, at landskassin eisini har noyðist at bera størri part av kostnaðinum, sigur Høgni Hoydal.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum ávarar tí ímóti, at man politiskt leggur seg útí arbeiðið hjá P/F Vágatunnlinum.

## Nevndin suveren

Heldur ikki Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, hevur hug at leggja seg út í arbeiðið hjá nevndini.

– Grundleggjandi haldi eg, at tað er nevndin í P/F Vágatunnilin, ið hevur ábyrgdina av málinum. Vit noyðast at halda okkum til, at nevndin tekur rættar avgerðir, tá hon ásetur prísin. Og vísir tað seg seinni, at prísurin er mettur skeivt, so má tað eisini vera nevndin, ið fer inn og broytir hann, sigur Óli Breckmann. Hann leggur afturat, at politikararnir mugu vera sera varnir, áðrenn teir leggja seg út í arbeiðið hjá nevndini.

Formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum heldur ikki, at tað er rætt at fara inn og broyta upprunaligu ætlanina við P/F Vágatunnlinum, ið ásetur, at ein partur skal fíggjast við brúkaragjaldi, tí uttan henda leist gjørdist Vágatunnilin neyvan veruleiki.

Spurdur, hvørja støðu Fólkaflokkurin hevur til felags uppskotið, ið er væntandi frá vágatingmonnunum Marjus Dam og Jóanis Nielsen, sigur Óli Breckmann, at nú má uppskotið koma fyrst, áðrenn hann kann gera nakrar viðmerkingar til tað.

– Eg kann bara siga, at eg eri grundleggjandi ímóti, at politikararnir, nú arbeiðið er um at vera liðugt, leggja seg út í arbeiðið hjá nevndini fyri P/F Vágatunnilin, sigur Óli Breckmann.

## Gev nevndini ein kjans

Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, er ímóti, at politikararnir nú fara at broyta upprunaligu ætlanina við Vágatunnlinum. Hann vísir á, at undirsjóvartunnilin varð bygdur við teimum fortreytum, at hann skuldi hvíla í sær sjálvum.

– Løgtingið hevur samtykt hesa loysnina, og tí er tað skeivt at politikararnir nú leggja seg út í arbeiðið hjá partafelagnum. Vit kendu fortreytirnar, tá arbeiðið fór í gongd, og tí haldi eg, at vit eiga at geva P/F Vágatunnlinum ein møguleika, sigur Jenis av Rana.

Formaðurin í Miðflokkinum heldur, at nú eiga vit at sláa kalt vatn í blóðið, og lata tíðina vísa, hvussu nýtslumynstrið verður av tunnlinum. Vísir tað seg, at prísurin er skeivt ásettur, so má tað eisini vera uppgávan hjá nevndini at broyta hann, heldur Jenis av Rana. Eftir hansara tykki eiga politikarnir ikki at blanda seg, fyrr enn nevndin blakar handklæðið í ringin og boðar frá, at hon ikki megnar sítt arbeiði. Tá hava politikararnir ein trupulleika at halda seg til. Men higartil hevur nevndin gjørt sítt arbeiði, og tí eiga politikararnir ikki at blanda seg, heldur Jenis av Rana.

Eins og Miðflokkurin hevur heldur ikki Sjálvstýrisflokkurin stórvegis hug at leggja seg út í málið. Kári P. Højgaard, ið tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, vísir á, at politikararnir hava lagt eina uppgávu út til eitt partafelag at taka sær av, og tí er tað trupult nú aftaná at taka nevndina av ræði.

– Tað var politisk semja um at nýta hesa loysn fyri Vágatunnilin, har eitt partafelag stendur fyri arbeiðinum. Við nú at taka nevndina av ræði og t.d. politiskt áseta ein annan kostnað, hava vit í veruleikanum sent nevndina til hús, metir Kári P. Højgaard.

Hóast tingmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum metir, at prísurin fyri at nýta tunnilin er høgur, so vísir hann samtíðis á, at man má ganga út frá, at nevndin hevur gjørt sínar meting eftir givnum fortreytum og bestu sannføring. Tó kundi hann sjálvur ynskt, at nevndin lurtaði eftir teimum mongu, ið hava víst á, at lægri prísur viðførir størri nýtslu.

Kári P. Højgaard sigur seg ikki vera serliga hugaðan fyri uppskotinum at flyta útreiðslur, t.d. frá rakstrinum, úr P/F Vágatunnilin og aftur í landskassan.

– Eg haldi tað vera sera óheppið, um vit nú aftaná sleppa upprunaligu ætlanini, og lata landskassan gjalda størri part av kostnaðinum, sigur Kári P. Højgaard.

## Ætlanin endurskoðast

Teir báðir stóru and-støðuflokkarnir, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, ásanna báðir, at kostnaðarætlanin hjá Vágatunnlinum, nú nýtslugjaldið er ásett, má endurskoðast.

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, vísir á, at Javnaðarflokkurin upprunaliga var ímóti leistinum við einum partafelag, men síðan mátti ásanna, at tað var ein fyritreyt fyri at tunnilin kundi gerast veruleiki.

– Tað er greitt, at loysnin við partafelagnum leggur útreiðsluna uttanfyri fíggjarlógina. Men í síðsta enda snýr tað seg allíkavæl um pengar. So tá vit nú síggja, hvat fyri eitt nýtslugjald krevst fyri at rinda fyri tunnilin, so bendir tað á, at býtið millum landskassans part av fíggingini og partin, ið P/F Vágatunnilin skal gjalda, hevur verið skeivt. Tað vil siga, at almenni parturin hevur verið ov lítil, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann staðfestir, at verandi prísur er ov høgur, og vísir á, at nú eru tveir møguleikar at taka: antin at tað almenna átekur sær part av lánibyrðuni hjá P/F Vágatunnlinum, ella at raksturin verður fluttur yvir í landskassan.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum metir, at politiskt ber ikki til at forsvara eitt so høgt nýtslugjald, og tí er neyðugt at endurskoða verkætlanina. Men samtíðis ásannar Jóannes Eidesgaard, at hetta fer at ávirka aðrar íløgur, millum arbeiðið við at gera Norðoyatunnilin, ið nú má endurskoðast, so sama mistak ikki verður gjørt einaferð afturat.

Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum, tekur undir við, at ætlanin við P/F Vágatunnlinum má endurskoðast. Hon vísir á, at hóast tað besta hevði verið, um leiðslan fyri P/F Vágatunnilin sjálv kundi broytt tað alt ov høga nýtslugjaldið, so slepst neyvan undan at politikararnir leggja seg út í málið.

Forkvinnan í Sambandsflokkinum sigur, at enn hevur flokkurin ikki viðgjørt uppskotið um at flyta rakstararútreiðslurnar fyri tunnilin yvir í landskassan, sum m.a. Marjus Dam hevur boðað frá, er á veg. Men hon sigur, at fæst ikki onnur og betri loysn, so tað gerst bíligari at nýta tunnilin, so tekur hon undir við uppskotinum. Eins og formaðurin í Javnaðarflokkinum, ásannar Lisbeth L. Petersen, at ein tílík loysn fer at ávirka, og helst eisini seinka, arbeiðinum fram ímóti føstum sambandi undir Leirvíksfjørð.

## Ávirkar Norðoyartunnilin

Hóast samgonga og andstøða ikki er á einum máli um, hvat er rættast at gera í samband við Vágatunnilin, so eru allir flokkar samdir um, at gongdin við Vágatunnlinum fer at ávirka arbeiðið við at gera Norðoyatunnilin, so ella so. Flokkarnir tykjast samdir um, at fer landskassin nú at gjalda størri part av útreiðslunum til Vágatunnilin, so verður neyðugt at endurskoða verkætlanina við Norðoyatunnlinum, ið so helst eisini gerst ein tyngri útreiðsla fyri landskassan.



# Møtast og skiljast



*Høgni Hoydal og Bjarni Djurholm húsast saman við løgmanni, sum ikki kundi vera við á myndini, tætt saman úti í Tinganesi. Á myndini síggjast inngongdirnar til Løgmansskrivstovuna, t.v., Vinnumálaráðið t.h. og Løgmálaráðið longst burtur. Hóast nærmastu grannar, er ein felags pedellur tað einasta felags fyri øll trý.*
*Jens Kristian Vang*

**Hóast Tinganes hýsir trimum ráðum, sum eru minni enn tíggju metrar frá hvørjum øðrum, er ein felags pedellur tað einasta, sum ráðini eru felags um. Seinasta stigið er at skilja Løgmálaráðið frá Løgmansskrivstovuni, og har verður nógv gjørt fyri at skilja at**

UMSITING
*Heri á Rógvi*

Stendur tú millum bygningarnar hjá almennu umsitingini úti í Tinganesi, kanst tú gera ein lítlan sirkul millum trý ymisk ráð. Rættari sagt tvey ráð og eina løgmansskrivstovu. Við einum umleið fimm metrar radius røkkur tú inn til trý ymisk almenn stýri. Trý ymisk kontór ella ráð, sum umsita hvør sín part av almennu fyrisitingini.

Øll eru neyðug fyri at tryggja landsins borgarum bestu fyrisiting av landsins áhugamálum. Verandi skipan við ráðharraábyrgd inniber higartil átta ymisk ráð íroknað Løgmansskrivstovuna. Upprunaliga var ætlað við bygnaðarbroytingunum hjá Finn Norman Christensen at hava seks stýri (seinni ráð). Hetta tal er so voksið nakað. Ein av grundgevingunum fyri at veksa um talið av ráðnum er, at Føroyar skulu gerast meiri sjálvstøðugar, og leiðin gongur ímóti einum fullveldi, har øll málsøki at kalla skulu umsitast av føroyingum sjálvum.

## Stongja av

Seinasta nýggja ráðið í almennu umsitingini er Løgmálaráðið. Í fráfarnu samgongu var talið av landsstýrismonnum hækkað úr sjey til átta. Høgni Hoydal, landsstýrismað í lógarmálum, og Anfinn Kallsberg, løgmaður, deildust um eitt og sama stýri.

Við teirri nýggju samgonguni, sum tók við í juni mánað í ár, varð ein níggindi landsstýrismaður settur, og Høgni Hoydal fekk sítt egna ráð at ráða yvir í form av einum løgmálaráð.

Høgni Hoydal segði í tí sambandinum, at hetta var eitt neyðugt stig, nú arbeiðast skuldi fram ímóti at yvirtaka fleiri og fleiri málsøki.

Sambært Høgna Hoydal starvast fjúrtan fólk á Løgmálaráðnum, og tað eru í roynd og veru fólk, sum hava starvast á Løgmansskrivstovuni.

Deildarleiðarin á gomlu løgdeildini á Løgmansskrivstovuni er nú aðalstjóri fyri Løgmálaráðið. Í høvuðsheitum eru tað eisini starvsfólkini á gomlu løgdeildini, ið flyta frá skrivstovu til ráð.

Arbeiðið at skilja stovnarnar at er nú komið so langt ávegis, at Løgmálaráðið hevur fingið egna inngongd. Løgmálaráðið fer at nýta fleiri bygningar úti í Tinganesi: Gamli Prestagarðurin, Leigubúðin, Skibstedspakkhús og seinast, vit frættu, hugdu teir eisini upp á møguleikararnar at nýta gomlu Munkastovuna.

Hóast starvsfólkið á Løgmálaráðnum áður hevur kunnað gingið gjøgnum inngongdina hjá Løgmansskrivstovuni verður egin inngongd gjørd, og Løgmálaráðið skal eisini hava egna móttøku, sum liggur einar tíggju metrar frá inngongdini og móttøkuni hjá løgmanni.

Ikki nokk við tí. Gongin, sum bindur Skibstedspakkhús og Sjó- og vektarbúðina saman, skal í framtíðini vera stongd av, soleiðis at skilja, at skulu fólk av Løgmansskrivstovuni niðan til teir lógarkønu í Løgmálaráðnum skal farast útum dyrnar.

Sambært Høgna Hoydal er einasta felagsfunktión millum skrivstovu løgmans og Løgmálaráðið ein felags EDV-skipan. Alt annað er fullkomiliga skilt at. Tó leggja bæði løgmaður og landsstýrismaðurin í lógarmálum stóran dent, at einki nýtt starvsfólk er sett í starv, nú skrivstova og ráð skiljast at.

Einar 3-4 metrar frá inngongdini til Løgmansskrivstovuna heldur Vinnumálaráðið og landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm til.

Felags fyri Løgmálaráðið, Vinnumálaráðið og Løgmansskrivstovuna er ein pedellur. Hesin er settur í starv hjá Løgmansskrivstovuni, men hann røkir eisini ráðini bæði.

Vinnumálaráðið nýtir ikki somu EDV-skipan sum felagarnir nakrar metrar vestureftir.

Hjá Vinnumálaráðnum starvast átjan fólk, á Løgmansskrivstovuni eru tey 19 og við teimum fjúrtan á nýggja Løgmálaráðnum gevur hetta eitt samlað starvsfólkatal úti í Tinganesi upp á 51.

Viðmerkjast skal, at íroknað hesi 51 eru ymsir stovnar, ið ráðini hava fingið álagt at umsita, men sum verða roknaðir sum partar av ráðunum.

Rokna vit Løgmansskrivstovuna sum eitt ráð, eru hesi 51 fólkini spjadd millum trý ráð. Hetta merkir m.a. tríggjar inngongdir, trý ymisk telefonnummør og tríggjar fyrisetingar lið um lið.

## Ongar hálvar loysnir

Høgni Hoydal heldur ikki, at nýggja skipanin við at skilja funktiónirnar at er tann mest hepna loysnin.

— Eg haldi so avgjørt, at tað hevði borið til við felags inngongd og felags journalskipan, men hetta vildi løgmaður so ikki, sigur Høgni Hoydal.

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, váttar eisini, at tað er hann, sum hevur tikið avgerðina um at skilja Løgmansskrivstovuna og Løgmálaráðið hvørt frá øðrum. Hann heldur ikki, at tað er nakað forgjørt í, at so lítið samstarv er millum fyrisitingarligu stovnarnar í Tinganesi.

— Antin velur tú at stovna eitt ráð við egnari umsiting, ella letur tú vera við at stovna nakað nýtt ráð, sigur løgmaður.

Hann leggur dent á, at hann ikki ynskir, at nakrar hálvar loysnir skulu koma fyri.

— Tað snýr seg um at plasera tað poltisku ábyrgdina á hvørjum øki sær. Onkur skal í síðsta enda hava ábyrgdina av hvørjari funktión sær, sigur Anfinn Kallsberg.

— Nú hevur man ynskt at verða skildur frá Løgmansskrivstovuni, og tí verður Løgmálaráðið eisini skilt frá, sigur Anfinn Kallsberg.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, heldur ikki, at skipanin í Tinganesi ber boð um nakran rationellan rakstur.

Hann vísir á, at fleiri stovnar við góðum úrsliti húsast undir sama taki á Argjum. Hesir eru allir stovnar, ið hoyrir undir málsræðið hjá fíggjarmálaráðharranum.

Hóast Karsten Hansen er settur at syrgja fyri, at sum mest fæst burturúr almennu pengunum, so kann hann einki gera við málið, tá løgmaður hevur tikið hesa støðu.

Løgmaður ásannar, at við verandi samstarvi millum ráð og Løgmansskrivstovuna, kundu Løgmálaráðið og Vinnumálaráðið tað sama ligið aðrastaðni. Hesin møguleikin er heldur ikki fjarur, tá uppgávurnar gerast møtumiklari hjá serliga Løgmálaráðnum.

— Vit mugu eisini hyggja eitt sindur fram í tíðina. Løgmálaráðið vil við fleiri yvirtøkum fáa nógv størri arbeiðsuppgávur, og tá er tað als ikki vist, at Løgmálaráðið fer at liggja í Tinganesi, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sipar serliga til løgreglu- og rættarmál, sum einaferð skulu á føroyskar hendur, eftir ætlanini hjá sitandi samgongu. Hetta fer at krevja munandi meira umsiting.